# Arbeiðarafeløg og arbeiðsgevarar sinnað at ganga nýggjar leiðir

**– Arbeiðsgevarar og arbeiðarafeløg eru samd um at kanna um Landsstýurið er áhugað í at gera sítt fyri at forða fyri at kostnaðarstøðið í Føroyum skal hækka so nógv, sigur formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag**

KOSTNAÐARSTØÐIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Okkurt má gerast og tað má gerast nú, sigur Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag. Arbeiðarafeløgini og Arbeiðsgevarar fara nú at royn at royna at finna eitt felags útspæl og so fara tey at biðja um fund við landsstýrið um kostnaðarstøðið í Føroyum*

– Vit vilja hava at vita um onkur annar møguleiki er, uttan áhaldandi at trýsta lønirnar uppeftir.

Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, er fegin um fundin, sum nú hevur verið ímillum arbeiðarafløgini og Arbeiðsgevararnar um kostnaðarstøðið.

Tað er hann, sum fyri einum ári síðani legði upp til hendan fundin, sum nú hevur verið ímillum øll arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevararnar.

Í fyrstuni var hugurin fyri at hava ein slíkan fund ikki serliga stórur.

Men síðani hevur spurningurin um kostnaðarstøðið í Føroyum verið nógv frammi. Serliga hevur tað verið frammi, at kostnaðarstøðið er so høgt, at vinnan í Føroyum missur kappingarførið.

Avleiðingin er, at alt ov nógvur fiskur fer óvirkaður av landinum.

Og nú er støðan mýkt so mikið, at tað ber til hjá arbeiðsgevarum og arbeiðarafeløgum at sessast við sama borð at tosa um kostnaðarstøðið.

### Samd um at fara víðari

Hans Joensen vil ikki gera so nógvar viðmerkingar til fundin enn.

Men hann sigur, at bæði arbeiðarafeløg og arbeiðsgevarar eru samdir um at fara víðari við málinum.

– Ætlanin er nú at seta nøkur punkt upp, sum vit í felag skulu tosa við politiska myndugleikan um, sigur hann.

Hann sigur, at endamálið við øllum hesum arbeiðnum er at vita um tað ikki er onkur gongd leið á arbeiðsmarknaðinum enn hesar afturvendandi lønarhækkingarnar, sum eru við til at hækka kostnaðarstøðið og gera kappingarførið verri.

– Men treytin er, at verkafólkið skal hava meiri eftir í lønarposanum, tá ið skattir og avgjøld eru goldin. Tí verður neyðugt at fáa politikararnar við, sigur Hans Joensen.

Og hann sigur, at endamálið við fundinum við landsstýrið er at vita, um politiski myndugleikin er áhugaður at samvirka við arbeiðsmarknaðin um at royna at forða fyri, at kostnaðarstøðið skal hækka so nógv.

Men hann sigur, at ein treyt er eisini, at lønirnar hjá verkafólki skulu ikki dragna longur afturímóti lønunum hjá tí almenna.

So skal privati arbeiðsmarknaðurin avmarka síni lønarkrøv, skal almenni arbeiðsmarknaðurin gera tað sama.

– Eg tvíhaldi um, at gjógvin ímillum tey alment løntu og verkafólkið skal ikki gerast størri enn hon er nú, sigur Hans Joensen.

Sjálvur heldur hann, at tað er neyðgut at fáa kostnaðarstøðið at lækka.

– Arbeiðsgevarar gremja seg dúgliga um kostnaðarstøðið. Vit hava tvinnar kostir í at velja. Antin trúgva vit teimum, ella trúgva vit teimum ikki, men halda, at hetta er bara nakað, teir siga, fyri at ræða okk-um.

– Men hava teir grein í sínum máli, kann tað fáa óhugnaligar avleiðingar, bæði fyri øll verkafólk og fyri samfelagið alt.

Hann heldur eisini, at allur tann óvirkaði fiskurin, sum fer av landinum, er besta dømi um, at okkurt má gerast.

– Og tað má okkurt gerast nú, sigur hann.

# Slóðbrótandi fundur um kostnaðarstøðið í Føroyum

**Fyrsta stigið er nu tikið í eini roynd at fáa avtalu ímillum partarnar á arbeiðsmarknaðinum og landsstýrið um at lække skattir og avgjøld, so at fakfeløgini afturfyri ikki skulu krevja so stórar lønarhækkingar sum annars**

KOSTNAÐARSTØÐIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*–Arbeiðsgevarar og arbeiðarafeløg ini samd um at royna at finna eitt felags útspæl, sum tey síðani ætla at fara til landsstýrið við, sigur Johan Páll Joensen, formaður í Arbeiðsgevarafelagnum. Endamálið er at royna at avmarka hækkinguum í kostnaðarstøðinum*

Fyri einum ári síðani sáddi formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag ein nýggjan spíra í føroyskum arbeiðsmarknaðarpolitikki.

Og nú er kanska okkurt, sum bendir á, at tað kanska eisini fer at eydnast at heysta fruktirnar.

Hans Joensen fekk ógvuliga blandaða móttøku, tá ið hann fyri einum ári síðani nevndi møguleikan at taka upp samráðingar ímillum landsstýrið, arbeiðsgevarar og arbeiðarafeløg um at lække skattir og avgjøld.

Afturfyri skuldi arbeiðarafeløgini lata vera við at seta so hørð lønarkrøv, tá ið samráðingar vóru. Og enntá varð møguleikin nevndur fyri beinleiðis at lække lønirnar.

Hetta tóku arbeiðsgevararnir undir við alt fyri eitt. Men hini arbeiðarafeløgini vóru milt sagt meiri ivingarsom.

Síðani má sigast, at tankin um beinleiðis lønarlækkin sleptur. Men eftir stendur so tankin um at lata vera við at krevja so stórar lønarhækkingar, um tað ber til at fáa eina avtalu við politikarar um at lække skattir og avgjøld.

### Samd um eitt felags átak

Hetta vóru spildurnýggir tónar í føroyskum arbeiðsmarknaðarpolitikki.

Men kanska eru vit á veg inn í eina nýggja tíð í Føroyum.

Í øllum førum hava arbeiðarafeløg og arbeiðsgevarar havt fund, har tey tosaðu um kostnaðarstøðið og lønarlagið í Føroyum.

Johan Páll Joensen, formaður í arbeiðsgevarafelagnum, sigur, at høvuðsevnið á fundinum kostnaðarstøðið í Føroyum.

– Samstundis eru arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevararnir samd um, at tað almenna hevur gingið undan at trýst lønarlagið í Føroyum uppeftir. Og partarnir skilja eisini, at arbeiðarafeløgini ikki vilja dragna longur afturút afturímóti teimum almennu lønunum, sigur formaðurin í Arbeiðsgevarafelagnum.

– Partarnir tosaðu um ymisk viðuskifti, sum hava við kostnaðarstøðið at gera og vit tosaðu um, antin nakrir møguleikar eru fyri at fáa tað at lække ella at avmarka framhaldandi hækkingum.

– Í hesum sambandi samdust arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevararnir um, at tað var rætt at fara undir eitt felags átak fyri at fáa kostnaðarstøðið niður.

Men skal nakar møguleiki vera, verður tað neyðugt at fáa politiska myndugleikan uppí.

– Tað, sum serliga varð viðgjørt á fundinum, var, um tað kanska funnust ávís mál, sum arbeiðarafeløg og arbeiðsgevarar kundu samst um at farið til politiska myndugleikan við í felag.

Og arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevararnir eru samdir um at fara undir arbeiðið at seta nøkur punkt upp.

Síðani skulu partarnir biðja um fund við politiska myndugleikan um hesi punktini.

### Tosaðu mest um almenn avgjøld

Formaðurin í Arbeiðsgevarafelagnum sigur, at tað, sum arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevararnir serliga tosaði um, var skattatrýstið og øll tey almennu avgjøldini, serliga oljuavgjald, mvg á neyðsynjarvørum o.s.fr.

Tí fer ætlaði fundurin ímillum arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevararnir øðrumegin og landsstýrið hinumegin, mest at vera um, antin tað ber til at fáa eina greiða avtalu við landsstýrið um at lække skattin, og nøkur av almennu avgjøldunum.

Tann djúpara meiningin við øllum er, at fæst ein slík avtala í lag, kunnu fakfeløgini afturfyri lata vera við at sett so hørð lønarkrøv, sum tey annars høvdu gjørt. Men tað altavgerandi fyri fakfeløgini, er, at tey hava meiri eftir av lønini, tá ið skattur og avgjøld eru goldin.

Johan Páll Joensen, formaður í arbeiðsgevarafelagnum, sigur, at onki ítøkiligt kom burturúr fundinum og hann leggur dent á, at enn er hetta arbeiðið á byrjunnarstøði. Men gongdin er ógvuliga positiv, leggur hann afturat.

Og á fundinum samdust arbeiðarafeløgini og Arbeiðsgevarafelagið kortini um, at tað var rætt at fara víðari við málinum.

Nú skulu arbeiðarafeløgini so viðgera málið víðari innanhýsis.



